## Todi er ivasamur

Um vikuskiftið byrjar norska landskappingin í fótbólti, men tað er ikki vist, at Todi Jónsson spælir við í fyrsta dystinum. Hann hevur framhaldandi trupulleikar av hælsinuni, og í gjár vandi hann ikki saman við hinum spælarunum hjá Start.

– Í morgin fari eg at royna at venja við bólti, og so fáa vit at síggja, hvussu tað fer at ganga, sigur Todi Jónsson við Fedrelandsvennen.

Fyrsti dysturin hjá Start verður ímóti Lyn sunnudagin, og umframt Toda eru eisini tríggir aðrir stuðulsspælarar ivasamir til dystin.



## KR vann venjingardyst

Íslendska felagið KR vann í gjárkvøldið venjingardyst ímóti Hauka. Dysturin endaði 2-1 til felagið hjá Rógva Jacobsen. Rógvi hevur verið óførur at gera mál í venjingar- og steypadystum í ár, men hann var ikki millum málskjúttarnar í gjárkvøldið. Málini hjá KR skutu Gunnlaugur Jónsson og Sølvi Davíðsson. Hauka minkaði um munin, tá ið 20 minuttir vóru eftir at spæla av dystinum.

# Flottar framsýningar hjá Støkk



*Tær 5-6 ára gomlu genturnar vóru sera fittar*

**Um vikuskiftið vóru árligu fimleikaframsýningarnar hjá Støkk í ítróttarhøllini í Runavík, har fleiri enn 500 fimleikarar vístu síni kynstur fyri familju, vinum og kenningum. Eini 1500 fólk vóru til framsýningina**

FIMLEIKUR
*Lív Reinert Kjeld*
*liv@sosialurin.fo*

Leygardagin og sunnudagin skipaði Fimleikafelagið Støkk fyri árligu framsýningini, har umleið 500 fimleikarar vístu síni kynstur fyri fleiri enn 1500 áskoðarum.

Árliga fimleikaframsýningin hjá Støkk var hesaferð býtt í tveir partar, soleiðis at yngru liðini sýndu fram leygardagin, og eldru liðini sunnudagin. Hetta er vorðið neyðugt, av tí at felagið er vaksið sera nógv seinastu árini, og framsýningarnar tí hava verið í so drúgvar.

Framsýningin er endabresturin á fimleikaárinum hjá vanligu liðunum, og tá sleppa tey at vísa nakað av tí, sum tey hava lært gjøgnum árið. Umframt vanligu liðini eru eisini kappingarliðini í estetiskum fimleiki og amboðsfimleikararnir hjá felagnum við á framsýningini, hóast teirra fimleikaár ikki endar fyrr enn seinni í vár og summar.

### Fjølbroytt

Fimleikararnir hjá Støkk eru í øllum aldri og eru eisini á ymiskum støði. Hetta gjørdi, at framsýningin var sera fjølbroytt og spennandi at síggja. Har vóru rútmiskar seriur og amboðsfimleikur við heilt frá ársgomlum børnum til vaksnar fimleikarar, og frá óroyndum til royndar fimleikarar á altjóða støði.

Fimleikafelagið Støkk fer seinni í ár at hátíðarhalda 40 ára stovningardagin hjá felagnum, og sigast kann ikki annað enn, at felagið er vaksið ótrúliga nógv hesi árini. Hyggja vit eftir sjálvum fimleikinum er hann eisini vaksin, mentur og broyttur sera nógv.

Tað sást, at fimleikarar og ikki minst venjarar hava gjørt eitt megnar arbeiði hetta fimleikaárið. Eftir framsýningina hoyrdust fleiri siga, at hetta var ein av teimum bestu hjá Støkk í fleiri ár, og má tað metast sum rós til felagið.

Teir fleiri enn 1500 áskoðararnir fingu eina sera góða fimleikaupplivíng í vikuskiftinum, og stóra talið av áskoðarum vísir, at áhugin fyri føroyskum fimleiki er sera stórur. Nú kunnu vit so gleða okkum til amboðs- og estetisku kappingarnar, sum vera seinni í vár.

## VÍF vann



*VÍF vann b-bólkin hjá dreingjum 12 ár í hondbólti í vetur. Standandi frá vinstru: Daniel Rapa, venjari, John Asbjørn Petersen, Niclas Simonsen, Rói Olsen, Áki Egilsnes, Sjúrður Olsen. Fremst frá vinstru: Jóhan Kári Vang, Magnus Borgarlíð, Teitur Thorleifsson, Thorstein Paulason Brattaberg. Á myndini vantar Jóhan Lisberg*


## FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*




**Hvar er bólturin?**

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.

ATLANTIC AIRWAYS

